Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingskvinna

Svarari: Djóni N. Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Førleikameting í Føroyum

Spurningar:

1. Hvussu gongur við førleikameting í Føroyum, og hvussu nógv verður hon brúkt?
2. Hvussu nógv verða árliga førleikamett innan yrkisútbúgvingarøkið?
3. Hvussu verður førleikameting raðfest fíggjarliga og ímillum ymisk øki?
4. Hvar og hvussu ofta verður lýst við møguleikanum at verða førleikamett(ur)?

Viðmerkingar:
Førleikameting varð innført við lóg í Føroyum í 2014. Galdandi kunngerð um førleikameting fekk virknað á vári í 2018. Sambært lógini var endamálið við at innføra førleikameting at veita fólki, 25 ár og eldri, í sambandi við útbúgving ella arbeiði, møguleika fyri førleikameting, sum tekur atlit at samlaðu førleikunum hjá tí einstaka, sum eru viðkomandi fyri at fara undir ávísa útbúgving ella arbeiði, og at støðið verður tikið í førleikum, sum eru fingnir í skúlaskipanini, í arbeiðslívi, frítíðarvirksemi ella á annan hátt.

Hugsanin var tá at eggja fólki, sum høvdu arbeitt rúma tíð innan eitt yrki, at nema sær fulla útbúgving við styttari skúlatíð ella styttari lærutíð, grundað á úrslitið av førleikametingini.

Lítið er at hoyra um, hvussu førleikametingin er ment hesi árini, og hvussu hon hevur gagnað føroyska arbeiðsmarknaðinum, síðani hon varð innførd. Og spurningurin er, í hvønn mun kunnað og lýst verður við hesum møguleika, og hvussu arbeitt verður við at styrkja førleikameting innan ymisk fakøki.

Búskaparráðið og Føroya Arbeiðsgevarafelag hava mangan umrøtt tørvin á útbúnari arbeiðsmegi til ávís øki á føroyska arbeiðsmarknaðinum, og tá kemur mangan til hugs, at kanska førleikameting er eitt av svarunum upp á tørvin á arbeiðsmarknaðinum. Summi tosa eisini um at stytta ávísar útbúgvingar fyri at rationalisera – og eisini tá kunnu tankarnir leita inn á førleikameting.

Av hesum orsøkunum verða spurningarnir settir, nú meira enn 10 ár eru liðin, síðani førleikameting varð innførd við lóg í Føroyum.

Á Løgtingi, 23. juni 2025

Hanna Jensen